# Betri hallarviðurskifti í Tórshavnar kommunu

**Í fleiri ár hava ítróttarfeløgini í Havn gramt seg um manglandi ítróttartímar til tey ymisku feløgini. Nú er ljós at hóma, tí hóskvøldi samtykti býráðið at gera - ikki eina, men tvær nýggjar hallir í Havnini.**

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*




Fyri fáum árum síðani var stórt trot á tímum til ítróttarfeløgini í Tórshavnar kommunu. Hondbóltsfeløgini, flogbóltsfeløgini, fimleikafeløgini og kanska eisini bamintonfelagið hava manglað tímar. Tað hava bert verið tríggjar hallir at metta tørvin hjá øllum feløgunum, nevniliga Høllin á Hálsi, Gundadalshøllin og badmintonhøllin.

Fyri nøkrum árum síðani kom so høllin í Hoyvík, og hon var heilt sikkurt til stóra hjálp. Hon hevur hjálpt til at metta tørvin hjá hoyvíkingum og kollfirðingum, og tí hevur trupulleikin ikki verið so stórur sum áður.

### Tríggjar nýggjar hallir

Men nú tykist Tórshavnar býráð hava tikið henda trupulleiki í álvara, tí heili tríggjar nýggjar hallir eru í væntu komandi árini. Tann fyrsta í røðini er í Kollafirði. Tann høllin er næstan liðugt gjørd, og var hon á fyrsta sinni karmur um eina ítróttarhending í vikuskiftinum, tá KÍF skipaði fyri spennandi hondbóltskapping.

Á býráðsfundi hóskvøldi bleiv harafturat samtykt, at tvær nýggjar hallir skulu gerast. Onnur verður á Argjum, vestan fyri fótbóltsvøllin. Tórshavnar býráð metti eina høll vera neyðuga á Argjum, tí at fólkavøksturin har hevur verið sera stórur síðstu árini. Onkur hevði hug at ilskast um uppskotið, tí at bóndin ikki hevði fingið nakað at vita um ætlanirnar, fyrrenn hann las tað í bløðunum. Hetta uppskot bleiv tó samtykt av býráðnum.

Síðsta høllin í vænta er ein høll til hondbóltsfelagið Neistan. Teir hava leingi havt ætlanir um at gera eina høll til felagið, tí teir meta felagið vera so stórt, at neyðugt er við egnari høll. Á býráðsfundinum bleiv eisini samtykt, at Neistin skuldi sleppa at gera eina høll, sum fer at standa á Landavegnum niðanfyri handilsskúlan.

Tá hesar hallir standa lidnar vera heili sjey hallir í Tórshavnar kommunu, og hetta fer sambært býráðn um at nøkta tørvin hjá ítróttarfeløgunum fyribils.

**formula.fo**

Hvønn dag í september mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnirnar innan 3. oktober kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan »Sudoku«.

Vinningurin er ein Fujitsu Siemens Amilo Pro V2035 fartelda frá Formula.fo, virði 7.995,- kr.

Fujitsu Siemens Amilo Pro V2035 hevur m.a.:
Intel Celeron M380 Processor · 1,6 GHz Celeron proccessor · 1 MB Cache · 512 MB DDR2 RAM PC533 · 60 GB S-ATA Harðdisk · DVD+/-RW DL Brennara · VIA N800 Grafikkkort upp til 64 MB Ljóðkort & Stereo Hátalarar · 10/100 Mbit netkort 4 x USB 2.0 · 15" WXGA TFT skíggja · Tráðleyst netkort GemTek 802.11 BG · 56K V.90 modem MDC1.5 · Windows XP Pro DK (MUI)

Drigið verður fyrstu vikuna í oktober.

Fyri at vera við í kappingini, skulu allar uppgávurnar verða loystar



## SEPTEMBER KAPPINGIN

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 7 | 8 | | 9 | | | 1 | 2 |
| | 9 | | | | | 6 | | 5 |
| | | | 8 | 6 | 4 | | | 3 |
| | 2 | | | | 8 | 9 | | 4 |
| | 6 | | 5 | | 2 | | 7 | |
| 1 | | 3 | 9 | | | | 5 | |
| 5 | | | 6 | 8 | 7 | | | |
| 4 | | 7 | | | | | 3 | |
| 9 | 8 | | | 1 | | 5 | 2 | |

SERA LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 7 | | | | | 4 | | |
| | 8 | | | | 6 | 5 | | |
| 6 | | | 5 | | | | 3 | 7 |
| | | 9 | 7 | | | 3 | | |
| | 1 | | 9 | 2 | 4 | | 8 | |
| | | 6 | | | 1 | 7 | | |
| 1 | 4 | | | | 3 | | | 6 |
| | | 5 | 1 | | | | 7 | |
| | | 8 | | | | | 2 | |

LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | 2 | 9 |
| 9 | 3 | | 1 | | | 6 | | |
| | 5 | | | | 2 | | | |
| | | 6 | 3 | | 5 | | 7 | |
| | | | 4 | | 7 | | | |
| | 8 | | 2 | | 6 | 1 | | |
| | | | 5 | | | | 9 | |
| | | 3 | | | 8 | | 1 | 2 |
| 6 | 2 | | | | | | | |

MIÐAL

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6 | 9 | | | 7 | | 2 | | |
| | 2 | | | | 1 | | | |
| | | | 2 | | | | | 9 |
| 4 | | | 6 | 9 | | | | 8 |
| | | 5 | | | | 7 | | |
| 2 | | | | 5 | 8 | | | 3 |
| 1 | | | | | 5 | | | |
| | | | 4 | | | | 3 | |
| | | 3 | | 1 | | | 6 | 5 |

TRUPUL

NAVN: ______________________ BÚSTAÐUR: ______________________

TELEFON: ______________________

Sendið til: Sosialurin · Box 76 · 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan "Sudoku"

SUDOKU

Sosialurin